LØGMÁLARÁÐIÐ

Vegleiðing — 19. februar 2008

# Kortskjøl við tilknýti til  býarskipan og/ella byggisamtykt

***- Plankort, sum vísa økisskipanina.***

## Plankortið verður til eftir hesi mannagongd:

**samtykt**
**hjá kommunustýri**

Tá býarskipan ella byggisamtykt er samtykt av einum kommunustýri, skulu kort og onnur planskjøl eyðmerkjast við dagfesting og tí støðu, sum skjalið hevur, t.d. broyting, endurskoðan, serstøk byggisamtykt v.m. Vísast skal til samtyktina hjá kommunustýrinum

- Tað eru hesi planskjøl, sum skulu fylgja viðgerðini av planinum fram til góðkenning.
- Avrit av skjølunum skulu vera váttaði.

**framløga**
**fyri almenninginum**

- Broytingar í mun til galdandi býarskipan/byggisamtykt skulu vísast á avriti av galdandi plankorti, men kunnu umframt vera lýstar nærri við kuti úr kortinum, supplerandi teksti og evt. modelli.  Slík fylgiskjøl skulu eyðmerkjast og eisini vísa til samtyktina hjá kommunustýrinum.
- Til framløguna skulu brúkast orginalu plankortini ella váttaði avrit av teimum.
- Saman við framlagdu uppskotinum til broytingar, skal verandi støða (t.v.s. galdandi planur) vera tøk, og tað skal greitt framganga, hvørjar broytingarnar eru.

**viðgerð**
**av viðmerkingum**

- Kærur og broytingaruppskot, sum sett verða fram í sambandi við framløguna, og sum kommunustýrið samtykkir at fylgja, skulu ikki førast á framløgdu planskjølini, men
- verða førd á serligt kort, sum týðiliga er eyðmerkt, so eingin ivi er um støðuna.

**góðkenning**
**Innlendismálaráðið**

- Kort og fylgiskjøl, sum send verða Løgmálaráðnum (LMR) til góðkenningar, skulu vera tey upprunaligu.

**dagføring**
**kommunan**

- Tá kommuna hevur fingið skriv frá LMR um, at uppskot til økisskipan ella broyting í økisskipanini - er ella kann verða góðkend – heilt ella partvíst, skal plankortið dagførast, so tað vísir nýggju galdandi støðuna.
- Kommuna hevur skyldu altíð at hava tøk fullfíggjaði og dagførd planskjøl, t.v.s. plankort og ásetingar.

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 358080 · faks 358085 · imr@imr.fo · www.imr.fo

- Váttaði avrit av dagførdu planskjølunum - kort og ásetingar – skulu beinanvegin sendast LMR bæði í pappír- og teldusniði. Viðvíkjandi sniði annars sí niðanfyri.

**Mælt verður til, at dagførdu planskjølini eisini eru í teldutøkum sniði og til ber at fáa váttaði avrit í PDF-sniði.**

**Um teldutøk plankort**

Verður arbeitt við teldutøkum kortum, skal hvørt stigið, sum nevnt er omanfyri, greitt og eintýðugt kunna endurskapast.

Mælt verður til at gera avrit (plott), sum kunnu læsast – eitt nú í PDF-sniði.

Saman við teldutøkum kortum skulu vera upplýsingar um snið, versión, evt. uppbýtið av tekningini (t.e. lagbýti), upploysn og k-skipan. Kortini skulu í máti og staðseting samsvara við alment brúktu kortskipanirnar (FK89/UTM29).

Gevið gætur, at tað er plan-tema'ið á kortinum, sum er galdandi **plankort**. Onnur tema - matrikulkort, myndakort v.m. - skulu kunna skiljast frá ella takast burtur úr kortinum.

**Um mát**

Vegleiðandi mát fyri plankort eru:

- M = 1:5.000 fyri yvirskipaðar planir
- M = 1:1.000 fyri smálutaðar planir

Tað er av stórum týdningi, at plankortini eru gjørd í hóskandi máti, so yvirlit lættliga fæst av galdandi økisskipan í allari kommununi, hvørjari bygd sær og av ávísum avmarkaðum øki, sum er viðgjørt fyri seg t.d. í serstakari byggisamtykt.

Gerið tí stór kort av minni økjum, heldur enn at savna alt á einum korti í ov lítlum máti. Men gerið samstundis yvirlitskort, so heildin eisini sæst.

**Plankort eru almenn skjøl, sum**

- **kommunan hevur skyldu at halda dagførd, eyðmerkt og alment atkomulig**
- **greitt og eintýðugt skulu vísa galdandi økisskipan og/ella samtyktar broytingar í økisskipanini**
- **í støðd, innihaldi og nágreini svara til ta regulering, sum liggur í samtyktini, tey eru knýtt at.**

**Løgmálaráðið, 19. februar 2008**